








# Nútímans raðhús ovarlaga í Havn

| | |
|---|---|
| Byggiár: | 1987 |
| Hæddir: | 3 |
| Støðd innan: | 114 m² |
| Grundøkið: | 90 m² |

Góð raðhús frá 1987, sum eru í trimum hæddum. Hjallur hoyrir eisini til.

Stílurin í raðhúsinum er hugnaligur og romantiskur.

Frá gongini er útgongd til ein hugnaligan útikrók við havamøblum.

Í miðhæddini er ein gongd og køkur og stova í einum. Frá køkini/stovuni er gott útsýni.

Á loftinum eru tvey kømur, eitt stórt og eitt minni kamar, og eitt baðirúm. Baðirúmið er gjørt av nýggjum og er sera snotiligt. Ljóst við svørtum flottum flísum á gólvinum. Borðplátan er av svørtum blonkum flísum og eitt flott nútímans hvítt hondvask. Frá loftinum hevur tú eitt frítt og fantastisk útsýni yvir alla Havnina og Nólsoynna.

Í niðastu hæddini er gongd, sum hevur útgongd til eina stóra og góða terassu, eitt kamar, baðirúm og kjallararúm.

Raðhúsini hava eisini eitt ovasta loft, sum kann nýtast til goymslurúm. Her er gólv lagt á. Eisini er ein krúpikjallari, sum kann nýtast til goymslu.

Raðhúsini hava fjarhita og mánaðaliga nýtslan er tískil lág.

Raðhúsini standa í Berjabrekku í einum friðarligum og sera barnavinarligum umhvørvi. Nógv børn, yngri sum eldri, eru í grannalagnum. Góðir handils møguleikar, stutt til vøggustovu/barnagarð og sera gott bussamband.

skyn